Ítróttar
Sosialurin
Nr. 71 • mánadagur • 10. apríl 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Stjørnan letur FM-venjaran fara

**Stjørnan fer ikki at leingja sáttmála við venjaran Lazar Kurdic, sum leiddi kvinnuliðið til føroyameitaraheitið í ár. Stjørnan ætlar at finna norðurlendskan venjara ístaðin**

STJØRNAN
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Um vikuskiftið var avgerðin tikin um, at venjarin hjá besta kvinnuliðnum hjá Stjørnuni ikki skal halda fram í starvinum.

Serbiski Lazar Kurdic kom til landið í fjør at venja kvinnuliðið og ungdómslið hjá Stjørnuni, og fyri smáum tveimum vikum síðani leiddi hann kvinnurnar til FM-heitið. Stjørnan var eisini í steypafinaluni, men mátti har lúta fyri Neistanum.

– Vit hava viðgjørt støðuna væl og virðiliga í felagnum, og vit eru komin til ta niðurstøðu, at vit leingja ikki sáttmála við Lazar, sigur Kristoffur Ragnarsson, formaður í Stjørnuni.

– Vit eru væl nøgd við arbeiðið hjá Lazar, men vit ætla okkum at royna nakað nýtt. Vit kundu hugsa okkum at fingið ein venjara, sum var nærri okkum í máli og mentan, sigur hann.

### Vilja hava norðurlending

Kristoffur Ragnarsson sigur, at Stjørnan hevur ikki funnið avloysaran hjá Lazar Kurdic enn, men felagið fer nú at leita miðvíst eftir einum nýggjum venjara, og ætlanin er, at tað skal ikki ganga ov long tíð, áðrenn nýggi venjarin er funnin.

– Vit kundu hugsa okkum at fingið ein norðurlending sum venjara, so at tað gjørdist lættari við tí málsliga, og ein møguleiki er, at vit seta ein føroyskan venjara, sigur Kristoffur Ragnarsson, sum tó ikki vil nevna ítøkilig uppskot til starvið í Stjørnuni.

– Tað skulu alla tíðina verða framstig í Stjørnuni, og tað er eisini galdandi fyri spælarahópin og venjaran til næstu kapping, sigur hann.

Tað hevur verið upp á tal, at Stjørnan skal fara við í europeiska kapping aftur, men enn er avgerðin ikki tikin um hetta.

– Vit droyma um europeiskan hondbólt, men enn er ov tíðliga at siga endaligt, um vit fara við í Europa Cup næsta vetur. Møguleikan er til staðar, men vit mugu viðgera hetta nærri í felagnum, áðrenn vit taka avgerðina, sigur Kristoffur Ragnarsson.

– Vit hava eitt ættarliðsskifti á veg í Stjørnuni, og tað er umráðandi, at vit arbeiða miðvíst við hesum spælarum. Teir skulu fáa hóskandi avbjóðingar, og tað hevði verið best, um vit eisini kundu givið teimum avbjóðingar í útlandinum á hvørjum ári, sigur hann.



*– Vit eru væl nøgd við arbeiðið hjá Lazar, men vit ætla okkum at royna nakað nýtt. Vit kundu hugsa okkum at fingið ein venjara, sum var nærri okkum í máli og mentan, sigur Kristoffur Ragnarsson, formaður í Stjørnuni*

## Claus liðugur fyri hetta kappingarárið

**Føroyski landsliðsspælarin Claus Bech Jørgensen hevur fingið álvarsaman lúskuskaða og spælir ikki aftur í hesum kappingarárinum. Hann verður neyvan tøkur til næsta landsdystin hjá Føroyum**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað stendur einki til hjá føroyska landsliðsspælaranum í enska felagnum Coventry. Fyri nøkrum vikum síðani fekk Claus Bech Jørgensen ein skaða í lúskuna, og hóast hann royndi at treiskast ímóti skaðanum í eina viku, gekk tað ikki.

– Eg havi ikki vant seinastu tríggjar vikurnar, og í løtuni fái eg ikki runnið. Eg rokni ikki við, at eg spæli aftur í hesum kappingarárinum, sigur Claus Bech Jørgensen.

Enska kappingin endar hálvan mai, og tí eru útlitini fyri meira spælitíð í hesum kappingarárinum døpur hjá føroyska landsliðsspælaranum.

– Vit vita ikki heilt neyvt enn, hvussu álvarsamur skaðin er, men í løtuni fái eg als ikki runnið, og tí er ikki sannlíkt, at eg spæli aftur næstu vikurnar, sigur hann.

– Eg havi fingið tvær sproytur fyri skaðan, men tær hava ikki hjálpt nakað serligt. Eg skal til viðgerðar hjá einum serfrøðingi í slíkum skaðum seinni í hesi vikuni, og vónandi fái eg meira vita um útlitini hjá mær tá.

### Eitt ár afturat í Coventry

Claus Bech Jørgensen hevur annars spælt rættiliga fitt á liðnum hjá Coventry í hesum kappingarárinum. Coventry spælir í næstbestu deildini í Onglandi, og har hevur liðið hildið til nøkunlunda miðskeiðis á stigatalvuni alt árið.

– Tað gekk sera væl eitt skifti, áðrenn eg varð skaddur, men seinastu dystirnar hava vit ikki fingið tey úrslitini, sum vit ætlaðu okkum, sigur Claus Bech Jørgensen.

Hann hevur eitt ár eftir av sáttmálanum við Coventry, og hann roknar ikki við at spæla aftur fyri felagið, fyrr enn kappingin byrjar aftur í august mánaði.